# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*»Vit ræðast tær ikki, og vit ætla ikki at lata tær – ella nakrar aðrar – sleppa framvið okkum«*

*Katrin Olsen um vónirnar til HM í rógving*

# Gøtumenn ætla sær víðari



*Stóri spurningurin hjá gøtumonnum er, hvørt Gunnar Nielsen verður tøkur til eitt av álopsplássunum á liðnum*

**Eftir 2-1 tap á útivølli móti lettiska Ventspils, eru vónirnar fyri víðari luttøku hjá gøtumonnum ikki heilt ongar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóskvøldið klokkan 18.30 tekur GÍ móti lettiska Ventspils á Svangaskarði. Talan er um dyst í UEFA-Cup kappingini, og hóast eysturevropisk lið sjáldan hava hóvað føroyskum feløgum serliga væl, so eru vónirnar hjá GÍ ikki heilt ongar.

Hóast trýst frá heimaliðnum, so komu GÍ úr Ventspils við teprum 2-1 tapi í viðførinum, og sum útgangsstøði er tað avgjørt ikki at forkasta. Serstakliga ikki, tí mál á útivølli eru so sera týðandi í evropiskum uppgerðum.

### Gunnar sjúkur

Stóri spurningurin í Gøtu í løtuni er, hvussu verður við framherjanum, Gunnar Nielsen. Argentinski bóltsnilllingurin hevur verið sjúkur størsta partin av hesi vikuni, og enn er óvist, hvørt hann verður tøkur til dystin. Og skal GÍ standa seg, so er helst umráðandi, at sterkasta álopskortið kann vera við á vøllinum.

Hartil hevur Símun Louis Jacobsen eisini drigist við skaða, men roknað verður tó við, at hann er klárur at tørna til hóskvøldið.

### Skulu standa rætt

Um uppskriftina til dystin, sigur liðskiparin hjá GÍ, Sámal Joensen, at hon neyvan verður so øgiliga nógv øðrvísi, enn hon vanliga er hjá føroyskum liðum í altjóða dysti.

– Tað ræður sjálvandi fyrst og fremst um at standa rætt, og soleiðis sleppa undan nøkrum óneyðugum mistøkum. Sum støðan er, so er nóg mikið hjá okkum at skora eina ferð, um vit samstundis megna at halda tætt. Og tí vóna vit sjálvandi, at vit kunnu skora upp á onkran av møguleikunum, sm heilt víst fara at koma.

– Hinvegin, so fer Ventspils neyvan at leggja so nógv fyri, sum teir gjørdu í heimadystinum. Hóast okkara útgangsstøði kundi verið verri, so eru teir framvegis á odda, tá dysturin byrjar, og tí vilja teir helst fyrst og fremst halda fast. So talan kann gerast um eina varna uppgerð, so leingi einki mál er komið, heldur Sámal.

# Kæran gav linari revsing

**Juventus er framvegis í seriu B, men revsingin varð í dag broytt til 17 minusstig heldur enn 30. Milan sleppur í Champions League, og bæði Fiorentina og Lazio sleppa at halda fram í seriu A**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Somikið nógv linari vórðu dómarnir, tá italski kærudómstólurin í gjár gjørdi úrskurð í nógv umrøddu gøluni í italskum fótbólti.

Milan er nú aftur partur av Champions League kappingini. Fiorentina og Lazio vórðu upprunaliga dømd at flyta niður, men tey halda so fram í seriu A. Tey bæði byrja tó komandi kappingarárið við minus 19 og 11 stigum, meðan Milan skal byrja við minus átta stigum komandi kappingarár.

Álvarsamasta kærumálið er framvegis tað hjá Juventus, sum í fyrrverandi forsetanum eisini átti fremsti høvuðspersónunum í gøluni um avtalað úrslit. Nú er revsingin, at Juventus missir síni bæði seinastu meistaraheiti, og at felagið komandi ár skal spæla í seriu B, har teir byrja við minus 17 stigum.

Umboðsmenn fyri Juventus siga tó, at eisini hendan avgerðin verður kærd, tí teir vilja í minsta lagi hava, at felagið alt fyri eitt kann stríðast um uppflyting til seriu A. Og um neyðugt, so verður málið kært til sivil-rættin siga teir.

So er spurningurin bara, hvat FIFA sigur til tær ætlanirnar. Her í Føroyum hava vit í øllum forum staðfest, at tað ikki er nakað, sum fellur í góða jørð hjá altjóða fótbóltssamgonguni.

# Nógvur hiti í Kristiansand

Ferðalagið hjá Skála fór úr Føroyum við kós móti Kristiansand týsdagin. Ferðin varð gjørd umvegis Stavanger, og eftir tríggjar tímar í bussi var ferðalagið komið upp á pláss.

Fyrstu venjingarnar stóðu á skránni mikudagin. Men higartil hava spælararnir í øllum førum staðfest, at umstøðurnar at búgva eru framúr, har hópurin býr á hotellið við havnarlagið í Kristiansand.

Sjálvur dysturin verður spældur hóskvøldið klokkan 19 lokala tíð, og lítið er at ivast í, at Skála fær sína søk fyri í hesum. Ikki minst tí veðrið í Kristiansand hevur verið framúr seinastu dagarnar. Um dagin eru hitastigini um 30 í tali, og roknað verður við, at talan verður um 25 hitastig, tá dysturin skal spælast.

Hartil kemur eisini, at tey í Start nú hava størri álit á liðnum, enn tey hava havt. Dysturin á Svangaskarði varð seinasti dysturin hjá Tom Nordlie, og við nýggja venjaranum eru úrslitini vorðin munandi betri, enn tey hava verið. Somikið stórur er munurin, at áskoðararnir nú tosa um bronsumerki og europiskan fótbólt heldur enn botnstríð og niðurflyting.

Úr Kristiansand veit ferðaleiðarin hjá Skála, Sveinur Tróndarson, at siga, at hópurin er í góðum standi. Onkrir leikarar ganga enn við snuddum og verða tí ikki við, men tað er ikki nakað sum kemur óvart á. Bjarni Jørgensen, Poul N. Poulsen og Borgar Kristiansen høvdu allir snuddir, áðrenn farið varð heimanífrá, men annars tykjast allir menn at vera tøkir. Tað vil siga, at Bárður Danielsen, sum ikki var tøkur seinast, er tøkur til henda dystin.

**-mørk**